# Lagið á fólki er gott, og tey eru fegin um at vera komin aftur til arbeiðis

JENS PAULI PETERSEN



*Virkisleiðari er Jens Pauli Petersen (vm.) og hin er stjórin, Jógvan Dávid Jacobsen*

Tað var hin 4. desember í fjør, at Faroe Seafood fór á húsagang og virkini, sum felagið rak í Runavík, Toftum, Vestmanna, Havn og í Vági, lótu aftur.

Hendan sama dag gjørdist eisini greitt, at tey seks skipini, Bakur, Stelkur, Heykur, Falkur, Rókur og Lerkur, fóru at verða løgd.

Eftir sigldu skipini, sum Faroe Seafood átti part í, Jaspis, Ametyst og djúpvatnstrolarin, Edna.

## Hini virkini

Partafelagið frá 16. februar 2011 keypti sum kunnugt virkini í Saltangará, Toftum, Vestmanna og í Vági.

Stutt eftir keypið kom fram, at virkið í Vági fór at verða yvirtikið av alifelag og fer í fyrsta lagi at verða brúkt til sláturvirki.

Hetta kom eitt sindur dátt við hjá vágbingum, sum nú vónaðu, at virkið fór at verða latið uppaftur sum vanligt fiskavirki. Sláturvirkið er á havnalagnum frammanundan, tó at umstøðurnar har eru trongar. Nú fara hesar umstøður at gerast munandi betri, og vágbingar síggja ivaleyst fram til, at okkurt meiri fer at spyrjast burtur úr stóra flakavirkinum í Vági, so enn fleiri fólk sleppa til arbeiðis.

Poul Hansen, nevndarformaður í nýggja fiskivinnurisanum, hevur sagt, at málið hjá felagnum er at lata virkini í Saltangará og á Toftum uppaftur sum skjótast.

Hinvegin tykist ein ávís ógreiða vera um, hvat verður av virkinum í Vestmanna, ið annars hevur virkað væl sum fiskavirki gjøgnum mong ár.

Í aðrar mátar er líkt til, at teir, sum eiga skip í Vestmanna, hava eitt ávíst tilknýti til JFK í Klaksvík, sum rekur fiskavirkið á Kósini.

Nú einki virksemi hevur verið á fiskavirkinum í Vestmanna, eru nógvar lastir landaðar í Klaksvík, eins og líkt er til, at eitt ávíst figgjarligt tilknýti eisini er millum reiðarar í Vestmanna og JFK í Klaksvík.

Spurningurin er tí, hvussu sterkt ráfiskagrundarlagið er undir virkinum í Vestmanna í løtuni, um ikki tey skip, sum eru heimahoyrandi á staðnum, ikki venda aftur hagar.

Sum dagarnir ganga, man fara at koma undan kavi, hvussu verður við fiskavirkinum í Vestmanna.

*vilmund@sosialurin.fo*




*Fiskur kemur til virki í trailara*